

Annika Olsen
*landsstýriskvinna*
*í innlendismálum*

# Rúsevnissmugling ein tikkandi bumba undir føroyska samfelagnum

Tað tykist sum um, at rúsevnisnøgdirnar hækka fyri hvønn dag sum gongur, og nógv bendir á, at rúsevninini eisini gerast sterkari og meira vandamikil, sum koma til Føroyar. Vit kunnu fegnast um, at løgreglan ger eitt gott arbeiði við tað, at hald verður lagt á nógv rúsevni, men samstundis situr man eisini við óttanum um, at tað sum funnið verður bert er toppurin av ísfjallinum, tí rúsevnismuglarnir gerast betri og betri til at fjala rúsevnini.

Hagtøl vísa, at misnýtarar millum ung hækkar støðugt og sambært frágreiðing frá Blákrossheiminum vóru tað í 2006 4 fólk yngri enn 30 ár, ið høvdu leita sær viðgerð, meðan tað í 2009 vóru 24 fólk í hesum aldursbólki. Hetta eigur at fáa øll ávaringarljós at lýsa. Somuleiðis vísir tað seg, at ungfólk eru byrjað at blanda rúsevni við heilivág, har millum Ritalin, ið verður brúkt til fólk við sálarsjúku verður blandað við rúsevni.

### Meth-amfetamin slær met

Sambært hagtølum hjá løgregluni so var hald lagt á 2.988 gr. av meth-amfetami, sum er nakað væl sterkari enn vanligt amfetamin. Til samanberingar varð bert hald lagt á 132,80 gr í 2008 og 2,36 í gr í 2001. Meth amfetamin brýtur niður feitt skjótari enn vanligt amfetamin, sum ger at virknaðurin er 3-5 ferðir so sterkur sum vanligt amfetamin. Avleiðingarnar av hesum evni kann vera nervøsitetur, aggressivitetur, psykiskir trupulleikar, hjartatrupulleikar og heilaskaðar. Somuleiðis eru mongdirnar av ecstasy og Marihuana hækkaðar. Í 2009 var hald lagt á 4.818 av Ecstasy tablettum og 8 kg av marihuana. Tað er lítið at ivast í, at rúsevnini gera sítt til at harðskapur, eisini av grovari slag, er vorðin meira eyðsýndur í býarlívinum.

### Revsiramman fyri rúsevnismugling hækkað

Í fjør var revsiramman fyri rúsevnismugling hækkað fyri Føroyar. Samgongan setti sær fyri at bøta um revsirættarligu viðurskiftini í Føroyum herímillum trupulleikar viðvíkjandi rúsevnum og rúsevnissmugling. Fyri serliga grov rúsevnisbrot varð revsiramman hækkað úr 10 árum upp í 16 ár. Tað er tó ikki nokk, at heva revsirammuna fyri rúsevnismugling, men tað gevur hóast alt eitt poltiskt signal um, at rúsevnismsugling er eitt alvarsligt brot á revsireglurnar í Føroyum, og at hetta ikki verður góðtikið. Tað má tó setast inn á nógvum økjum. Eitt nú við upplýsning og at man styrkir tað fyribyrgjandi arbeiðið og hjálpir ungum, sum vísa seg, at vera í vandabólkinum, ikki enda í rúsevnistrupulleikum og harðskapsmálum. Her hevur samgongan somuleiðis sett inn við SSP samstarvinum, sum er eitt skipað samstarv millum sosialar myndugleikar, skúlan og løgregluna. Broytingar vóru gjørdar í rættargangslógini í 2009, sum heimilar løgregluna at vera við í hesum samstarvi. Í dag eru SSP samstørv kring landið.

Vit mugu taka rúsevnistrupulleikan í Føroyum í størsta álvara, tí fyri eitt lítið og viðbrekið land sum Føroyar kann hetta fáa sera álvarsligar avleiðingar fyri okkara ungdóm o.ø. Tað er ungdómurin, ið gerst offur fyri rúsevni, tað er ungdómurin, ið gerst offur fyri harðskapi, tí er tað sera týðningarmikið, at ungdómurin verður hildin skaðaleysur av rúsevnum. Og her eiga myndugleikar og politikarar eina ovurstóra uppávu at loysa.

Annika Olsen
*landsstýriskvinna*
*í innlendismálum*

# Barsilsskipan flutt til Tvøroyar uttan nakra politiska viðgerð

Tað kom dátt við, tá ið eg hoyrdi í tíðindunum í útvarpinum í dag, at landsstýrismenninir , Jóhan Dahl og landsstýrismaðurin við fíggjarmálum hava avgjørt, at Barsilsskipanin skal flytast úr Havn til Tvøroyar. Um hetta er ein liður í teirra økismenningarpolitikki ella valstríði, skal eg lata standa ósvarað, men løgið er tað at landstýrismaðurin í økismenningarmálum, nevniliga undirritaða, onki veit um hesa flytan. Hetta er ein avgerð, sum er tikin uttan um landsstýrið, og skal eg bara boða frá, at eg taki ikki undir við, at slíkar gerðir bert verða framdar yvir nátt uttan nakra poltiska viðgerð yvirhøvur. Tað er ikki langt síðan, at landsstýrismaðurin í heilsumálum Aksel Johannesen í sambandi við flytanina av heilsutrygdini úr Havn til Klaksvíkar, fekk greitt at vita frá løgmanni, at hetta átti at verið viðgjørt í landsstýrinum, og at framyvir skuldi ongin flytan av stovnum gerast av einstøkum landsstýrismonnum uttan at hetta hevði verið fyri á landsstýrisfundi. Vónandi stendur løgmaður við sítt orð, og gevur landsstýrismonnunum við vinnumálum og fíggjarmálum greið boð um at taka hesa flytanina aftur.



Jóannes Eidesgaard

# Vuvuzelain av Oyri

Nógv kann man siga um Edmund Joensen, men hansara politiska spinn seinastu tíðina hevur verið framúr gott. Hann dugur meistarliga javnvágina millum tann umugsaða statsmannin og so hin heldur primitiva íspegilin, sum ikki fer av vegnum fyri at brúka ósannindir, um tey tæna málinum.

Edmund Joensen hevur grein á síni heimasíðu, sum nú eisini finst á onkrum portali, sum hann kallar "Tann savnandi drotningin." Í greinini finst Edmund at, at onkur fjølmiðil hevur tikið upp málið um kostnaðinum av stásdøgurðanum hja løgmanni fyri drotningini og onkur annar spurningin um kongshús ella forseta.

Eg eri púra samdur við Edmundi í tí, at tað er ikki vanligt, at gesturin fær kostnaðin slongdan í høvdið, tá seinasti bitin er farin niðurum. Hetta er harumframt sera óføroyskt. Men vit hava ivaleyst agurkutíð, so okkurt skulu fjølmiðlar skriva um. Spurningurin um mornarki ella republikk er eisini frammi við millumbilum, men kjakið er neyvan háaktuelt, so riddarin norðan av Oyri kann sova róliga hvørja nátt fyri tí málinum.

Men hví tók eg so til pennin her mitt í summarfrítíðini?

Tað er einfalt tí, at vuvuzelain norðan av Oyri tvinnar hesa skriving saman við Javnaðarflokkinum. Hann kallar konsekvent Sosialin fyri okkara floksblað, hóast hann sjálvandi veit betur.

Javnaðarflokkurin hevur hvørki úttalað seg um prísin av døgurðanum ella spurningin um kongshús ella ei. Men tað hevur Sosialurin eftir øllum at døma gjørt. Sum Edmund og flest øll onnur vita, so seldu vit Sosialin nú fyri fleiri árum síðani, enntá við stórum hepni. Vit áttu blaðið á sama hátt sum sambandsfólk einaferð áttu Dimmalætting, men hetta er ein farin tíð sjálvt hjá Dimmu.

Eg eri rættiliga sannførdur um, at neyvan hevur nakar flokkur fingið so mong høgg frá Sosialinum seinastu árini sum júst gomlu eigararnir Javnaðarflokkurin. Tað hevði nú verið løgið fyri eitt floksblað at borið seg soleiðis at.

Men hóast Edmund fullvæl veit alt hetta, so sær hann ein møguleika at høgga í okkara flokk, sum eg haldi er sera ódámligur, men tíverri als ikki ókendur fyri Edmund.

Annars hava vit tíbetur enn talu- og skrivifrælsi, so hvat er frammi fært tú ikki stýrt Edmund. Men eg kann geva Edmundi rætt í, at viðhvørt verða orð søgd, sum nógv betur vóru ósøgd. Tað eru tað nógv dømi um.

Kanska tað hjálpir, um Edmund blæsir dúgligari í vuvuzelaina! Góð metafor Edmund.

***Kanska tað hjálpir, um Edmund blæsir dúgligari í vuvuzelaina!***